




# Slupplívið sum í gomlum døgum

## Felagið Føroysk Træseglskip fer í døgunum undan ólavsøku og fram til ólavsøkuaftan at skipa fyri regattasigling runt Føroya land

Leo Poulsen

Regatta'in verður frá 25. til 28. juli og høvi verður hjá ferðafólki at keypa sær ferðaseðil og sigla við gomlu seglskipunum Westward Ho, Jóhonnu, Norðlýsinum, Draganum og Fram.

Til ber at sigla við allan túrin runt ella ávísar teinar. Hesir eru Tórshavn - Tvøroyri sunnudagin 25. juli, Tvøroyri - Miðvág mánadagin 26. juli, Miðvág – Klaksvík týsdagin 27. juli og Klaksvík – Tórshavn ólavsøkuaftan 28. juli.

Fyri at vekja ans fyri okkara gomlu seglskipum – okkara mentanararvi á sjónum – gongur siglingarleiðin framvið so nógvum bygdum øki sum til ber. Ung sum gomul, ið sigla við, fáa kenslu av, hvussu tað var hjá okkara forfedrum at baksast á sjónum, tá bert seglini vóru á at líta.

Ein slík ferð verður ein heilt serlig uppliving. Á túrinum verður sjálvandi siglt sum veðurlíkindini eru og motorurin tikin til hjálpar av og á. Ólavsøkuaftan klokkan 12 leggja skipini at við Bursatanga í Havn.

Hetta er fyrsta árið, at ein slík regatta verður roynd, og endamálið er sm nevnt at skapa áhuga fyri gamla mentanararvinum, sum hesi seglskip eru. Vísir tað seg at hepnast væl, verður regattain tikin upp aftur komandi ár, og verður ein fastur, afturvendandi táttur.

Ferðaseðlar kunnu keypast á kunningarstovunum kring landið. Einkult ferð ella ein teinur, til dømis Tórshavn – Tvøroyri, kostar 300 krónur. Allur teinurin kring Føroyar kostar 1.000 krónur. Ferðaseðlar kunnu eisini keypast umborð. Til ber at keypa mat umborð, men gistast má í landi.

Tíðarætlan og annað er at finna á www.westwardho.fo.

leo@sosialurin.fo




## Anne Mette Klementsen

**Tillukku við starvinum sum prestur í Fuglafjarðar prestagjaldi.**
Takk fyri tað.

**Og tillukku við føðingardegnum í dag.**
Takk fyri, eg fylli jú 30 ár í dag.

**Tú ert gift føroyingi. Hevur tú innlit í føroyska mentan?**
Ja, tað havi eg. Eg havi verið við í útisetakórinum MPIRI í 10 ár. Eisini innan eg giftist manni mínum. Og vit hava eisini verið í Føroyum. Eg eri eisini komin nógv í Samuelskirkjuna í Keypmannahavn.
Hvaðani í Danmark ert tú?
Rødding, Sønderjylland.

**Dámar tær føroyskan mat, og um so er, hvat er tín yndisrættur?**
Mær dámar væl allan føroyskan mat. Og best kjálkar og knettir.

**Gleðir tú teg at flyta til Fuglafjarðar?**
Ja. Eg havi hitt kirkjuráðini og hava verið sera væl móttikin. Vit hava 2 børn og familjan gleðir seg eisini.

## Í MORGIN




Hvassur vindur upp í storm av landnyrðingi, seinnapartin nakað minni vindur. Fyrrapartin yvirhøvur turt men seinnapartin regn. Hitin millum 8 og 11 stig.

## FRÍGGJADAGIN




Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av eystri og landnyrðingi og ælingur, men kanska onkur sólglotti. Hitin millum 9 og 12 stig.

## LEYGARDAGIN




Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi, seinnapartin minni vindur av útsynningi. Sólglottar, men eisini okkurt ælið og hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi ella av ymsum ættum og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 9 og 13 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt hátrýst, 1013 hPa. norðan fyri Føroyar mennist. Eitt lágtrýst, 992 hPa. skamt í útsynning úr Írlandi fer í landnyrðing.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið yvir Írlandi fer í landnyrðing og brúgvaløgini haðani koma hendavegin við nógvun vindi – kanska stormi eitt skifti.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 70 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | 5 | Tromsø | 6 | Moskva | 16 | Athen | 26 |
| Reykjavík | 11 | Bergen | 12 | Berlin | 25 | Beijing | 30 |
| Tórshavn | 10 | Oslo | 22 | Paris | 20 | New Dehli | 30 |
| Lerwick | 9 | Stokkhólm | 20 | Madrid | 28 | Bangkok | 34 |
| Aberdeen | 12 | Keypmannah. | 19 | Róm | 26 | Sydney | 14 |
| London | 19 | Helsinki | 16 | Malorca | 26 | New York | 33 |

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 11. juli | Tendring |
| 13. juli | Mánin næstur jørðini |
| 18. juli | Fyrra kvarter |

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 14. juli | 09:29 | 21:55 | 08:29 | 20:55 | 08:44 | 21:10 | 11:29 | 23:55 | 00:03 | 12:29 | 07:44 | 20:10 | 06:44 | 19:10 | 09:44 | 22:10 | 10:44 | 23:10 | 09:14 | 21:40 | 10:29 | 22:55 |
| 15. juli | 10:19 | 22:44 | 09:19 | 21:44 | 09:34 | 21:59 | - | 12:19 | 00:55 | 13:19 | 08:34 | 20:59 | 07:34 | 19:59 | 10:34 | 22:59 | 11:34 | 23:59 | 10:04 | 22:29 | 11:19 | 23:44 |
| 16. juli | 11:08 | 23:32 | 10:08 | 22:32 | 10:23 | 22:47 | 00:44 | 13:08 | 01:44 | 14:08 | 09:23 | 21:47 | 08:23 | 20:47 | 11:23 | 23:47 | - | 12:23 | 10:53 | 23:17 | - | 12:08 |
| 17. juli | 11:56 | - | 10:56 | 23:20 | 11:11 | 23:35 | 01:32 | 13:56 | 02:32 | 14:56 | 10:11 | 22:35 | 09:11 | 21:35 | - | 12:11 | 00:47 | 13:11 | 11:41 | - | 00:32 | 12:56 |
| 18. juli | 00:20 | 12:58 | 11:58 | - | - | 12:13 | 02:20 | 14:58 | 03:20 | 15:58 | 11:13 | 23:52 | 10:13 | 22:52 | 00:35 | 13:13 | 01:35 | 14:13 | 00:05 | 12:43 | 01:20 | 13:58 |